Bjørg Hentze

Fra: Durita Kastalag
Sendt: fríggjadagur, 19. desember 2025 12:24
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Cc: Jákup Andrias Kristiansen; Sólvá Gunnarsdóttir Dam
Emne: Ummæli av uppskoti til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Til Almanna- og mentamálaráðið,

Útlendingastovan hevur tann 21. november 2025 fingið uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar til ummælis. Útlendingastovan hevur fylgjandi viðmerkingar:

Vit fegnast um, at tað nú kemur eitt lógaruppskot, sum setur greiðar karmar, heimildir og játtanir fyri at tryggja burturriknum ukrainum, sum landið hevur valt at tikið ímóti, virðiligan og støðugan bústað, betri fíggjarligar umstøður umframt fleiri og greiðari rættindir og skyldur. Útlendingastovan hevur leingi eftirlýst slíka lóg. Greiðar reglur v.v. rættindum og skyldum ger integratiónstilgongdina, sum lógaruppskotið í høvuðsheitum er, nógv lættari at fyrihalda seg til hjá bæði ukrainum og avvarðandi myndugleikum. Lógin stuðlar tískil uppundir væl eydnaðari integratión. Við serreglum um m.a. barníkoyti, føroyskt sum annaðmál, virknisvenjing og arbeiðsbúgving, fara ukrainar at fáa nógv betri møguleikar at fóta sær fíggjarliga, at leiga egnan bústað, at koma á arbeiðsmarknaðin og sum heild at verða væl integreraði í føroyska samfelagið.

Vit meta, at hetta er ein góð íløga, sum fer at merkjast og loysa seg væl í longdini. Við hesi lóg verða ukrainar meira javnsettir við føroyingar, sum politiska ynskið hevur verið frá byrjan. Men tað verður samstundis viðurkent, at støðan hjá flóttum er serlig, og at tey hava tørv á serligum tiltøkum, skal integratiónin eydnast til fulnar.

Út frá okkara royndum við at tryggja ukrainum bústað, meta vit tó, at hugtakið "varandi bústaður" eigur at verða skilgreinað nærri í lógini, soleiðis at tann, sum skal stuðla ukrainum at finna nýggjan bústað, hevur greiðar reglur at halda seg til, og fyri at fyribyrgja, at ukrainar aftur verða settir í eina keðiliga ringrás, har teir eru noyddir at flyta fleiri ferð og aftur hava tørv á bráfeingis bústaði frá tí almenna.

Vit takka fyri høvið at ummæla lógina og vóna, at hon verður samtykt.

Vinaliga / Kind Regards,

Durita Kastalag, integratiónssamskipari / integration coordinator
+298 356099 / duritak@vs.fo

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

+298 357979 • info@utlendingastovan • utlendingastovan.fo • integration.fo